


## Íløguspælið á ilogur.com - 6. vika

# Taparar kunnu gerast vinnarar

**Eingin grund er til at setast aftur, hóast ein liggur á niðurflytingarstrikuni og bert hevur reyð tøl. Ein kann saktans gerast vikuvinnari, hóast ein liggur aftast í spælinum. Tann eini vikuvinnarin hevði minus 70 prosent, men vann eitt kvøld fyri tvey á Goumet.**

ÍLØGUSPÆLIÐ
*Hilmar Simonsen*

Íløguspælið hevur verið í gongd í gott og væl ein mánað. So tíðin er komin til at taka temperaturin á spælinum. Hóast luttakararnir í spælinum eru minni virknir nú enn í byrjanini við at gera íløgur, so er áhugin framvegis stórur. Vit hava hitt Suna Justinussen, sølumann hjá Kaupthing, fyri at frætta um gongdin higartil.

- Bakka vit aftur til byrjanina av spælinum, so vóru vit spent eftir at síggja, hvussu tað fór at hilnast, eftir at spælið varð blivið seinkað. Men allur ivi varð beindur av vegnum, og skjótt høvdu yvir 4000 meldað seg til. Í byrjanini vóru fólk sera spent at keypa og selja partabrøv, og hesin áhugin er kølnaður nakað nú, men tað høvdu vit roknað við, greiðir Suni Justinussen, sølumaður hjá Kaupthing frá.

**Spurnarkassin nógv brúktur**

Hann vissar tó um, at áhugin framvegis er stórur, og tað sæst millum annað við teimum nógvu spurningunum, sum Kaupthing fær fær frá luttakarum. Fólk kunnu spyrja um Íløguspælið við at senda teldupost.

- Spælarar brúka dúgliga møguleikan at senda okkum spurningar. Spurt verður um mangt og hvat, sum hevur við íløgur at gera. Men fólk nýta eisini hetta høvið at siga okkum, um tey halda onkran snýta, heldur Suni Justinussen flennandi fyri.

Serliga vóru nógvir spurningar um teir spælararnar, sum fyri nøkrum vikum síðani vórðu koyrdir úr spælinum, tí teir høvud brúkt vitan framíhjá um realtíðar kursir. Hetta er ikki loyvt sambært reglunum fyri Íløguspælið.

- Summi skrivaðu inn til okkara fyri at vísa, hvussu glað tey vóru fyri, at hesir vórðu koyrdir úr spælinum. Onnur vildu vit, um ein skuldi vera bangin fyri at verða blakaður út, um hann stóð til at vinna. Men eg kann vissa um, at eingin verður koyrdur úr spælinum, sum hevur





hildið seg til spælireglurnar, sigur Suni Justinussen.

Leggjast kann í hesum sambandi afturat, at fyri at sleppa undan líknandi hendingum aftur var ein lítil broyting gjørd eftir hetta, so at ikki ber til at gera sær dælt av realtíðar-kursum longur.

**Kvøld fyri tvey á Gourmet**

Fyri at kveikja áhugan aftur hjá teimum spælarunum, sum eru dotnir heldur langt niður á støðulistan, hevur Kaupthing sett vikuligar vinningar til tann spælaran, sum fær best úrslit fyri eina viku. Tað hevur víst seg at gagna onkrum av aftastu spælarunum, hóast øll sjálvandi hava sama møguleika at vinna vikuligar vinningar.

- Tann eini vinnarin av vikuliga vinningingum var komin heilt niður á minus 70 prosent. So eingin ivi er um, at væl ber til at vinna eitt kvøld fyri tvey á Gourmet, sum hevur eitt virði á umleið 700-800 krónur, hóast ein er á niðurflytingarstrikuni, heldur Suni Justinussen fyri.

Áðrenn vinningar verða útlutaðir verður altíð kannað eftir, um spælarin hevur "reint mjøl í posanum".

- Ein sum stóð at vinna vikuligan vinning vísti seg at hava tveir profilar og varð tí strikaður, vísir Suni á.

So um ein vil vinna, so loysir tað seg best at halda seg til spælireglurnar, sær tað út.

**Kvøld fyri tvey á Gourmet til vikuvinnaran í Íløguspælinum**

Sum kunngjørt fáa spælararnir, sum standa seg best í Íløguspælinum hvørja viku, vinningar frá Kaupthing Bank. Besti spælarin er tann, ið hevur havt størsta vinning í prosentum farnu vikuna. Vinningurin hesaferð er eitt gávukort fyri tvey til eitt kvøld við serligari vín- og matskrá frá Gourmet.

**Besti spælarin í viku 44:**
Playsir

Avkastið hjá vinnaranum hesa vikuna: akr 312.616,81 (+34,17%)

Vinnarin fær beinleiðis boð.

Hjartaliga tillukku
Kaupthing Bank

**Gongdin hjá topp 3** (vika 44)




**Topp 10** (5. nov. 2007 kl. 11.09)

| Leikari | Reiður peningur | Partabrævaogn | Ogn | Avkast |
|---|---|---|---|---|
| navijoe | 272,83 kr. | 1.975.609,00 kr. | 1.975.881,83 kr. | +97,59 % |
| Ollysan | 8,92 kr. | 1.610.569,70 kr. | 1.610.578,62 kr. | +61,06 % |
| hanna21 | 68,57 kr. | 1.592.968,50 kr. | 1.593.037,07 kr. | +59,30 % |
| bjarnass | 183.051,92 kr. | 1.337.700,00 kr. | 1.520.751,92 kr. | +52,08 % |
| TNT | 929.159,20 kr. | 591.478,00 kr. | 1.520.637,20 kr. | +52,06 % |
| Mazda323 | 7.264,28 kr. | 1.419.867,26 kr. | 1.427.131,55 kr. | +42,71 % |
| GoogleInvest | 24,82 kr. | 1.419.052,80 kr. | 1.419.077,62 kr. | +41,91 % |
| jubiijan | 1.396.353,70 kr. | 0,00 kr. | 1.396.353,70 kr. | +39,64 % |
| partabrov2 | 105,00 kr. | 1.362.330,00 kr. | 1.362.435,00 kr. | +36,24 % |
| nr28 | 32.204,00 kr. | 1.327.950,00 kr. | 1.360.154,00 kr. | +36,02 % |